COVID-19 | CORONA

# INNANHÝSIS KUNNING TIL **STARVSFÓLK**

Kunna starvsfólkini væl og greitt um hvørjar tillagingar eru gjørdar á arbeiðsplássinum og um serligar mannagongdir eru galdandi.

Gev greið boð, um starvsfólk eru farin í sóttarhald, og hvørt hetta ávirkar onnur starvsfólk.

Savna alla innanhýsis kunning á einum stað – talgilt ella á einum sjónligum stað á arbeiðsplássinum.

Avmarka innanhýsis kunningina um covid-19 (Corona) til kunning og tilmæli frá almennum myndugleikunum – m.a. www.corona.fo.

Starvsfólk hava altíð eina skyldu til at seta seg væl og virðiliga inn í kunning frá arbeiðsgevaranum umframt at gera greitt, um kunningin er ógreið.

Arbeiðs- og brunaeftirlitið
FAROESE WORK ENVIRONMENT AND FIRE SAFETY AUTHORITY

TILMÆLI UM SKIPAN OG ATFERÐ Á **ARBEIÐSPLÁSSINUM**

**Les meiri á www.corona.fo og www.arb.fo.**